# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Hjálparfólk til Køkin

Í Køkinum er eitt tímalønt avloysarastarv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Talan er um eitt starv, sum svarar til umleið hálva tíð í síni heild. Arbeiðstíðin í Køkinum er vanligar gerandisdagar millum kl. 8.00 og kl. 15.00. Innanfyri áðurnevndu karmar verður eisini arbeitt eitt vikuskifti um mánaðin. Talan kann eisini verða um eykatímar fyri starvsetta.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir innan fyri køksarbeiði.

**Førleikakrøv:**
- samstarvsvilji
- ábyrgdarkensla

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- eitt arbeiðspláss í menning
- eitt starv við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Karl J. Granz, telefon 304540, lokal 1260, teldupostur: lskargr@ls.fo

**Umsóknarfreistin** er 2. mai 2008 kl. 12.00

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Læknaskrivari til Røntgendeildina**
Umsóknarfreistin er 21. apríl 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G1 fyrst og fremst til Kommunulæknatænastuna**
Umsóknarfreistin er 25. apríl 2008 kl. 12.00

**Starvsfólk til Goymsluna**
Umsóknarfreistin er 28. apríl 2008 kl. 12.00

**Deildarleiðari til Ljósmøðratænastuna**
Umsóknarfreistin er 28. apríl 2008

**Summarfrítíðaravloysarar**
Umsóknarfreistin er 6. mai 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo



# Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Hoydalar · FO-188 Hoyvík · Telefon: 312973 · Telefax: 318624
Teldupostur: skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: kl. 08:00 – 15:00

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2008 at rokna **5-7 føst størv** leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við eini samanseting av hesum lærugreinum:

**Alisfrøði, danskt, enskt, films- og sjónvarpskunnleiki, fornaldarfrøði, franskt, føroyskt, geografi, heimsspeki, lívfrøði, sálarfrøði, samfelagsfrøði, spanskt, støddfrøði, søga, teldufrøði og týskt.**

Harumframt eru **14-16 ársvikariat og/ella tímalærarastørv** í lærugreinunum:

**alisfrøði, danskt, enskt, evnafrøði, evning, føroyskt, geografi, ítróttur, lívfrøði, religión, samfelagsfrøði, spanskt, støddfrøði, søga, tónleikur og vinnulívsbúskapur.**

Møguligt er eisini at søkja ársvikariat í einum av hesum lærugreinunum saman við eini av lærugreinunum sum nevndar eru undir føstu størvunum.

Tímar eru eisini leysir til umsitingarleiðslu og kunnu søkjast saman við undirvísingartímum til annað hvørt fast starv ella ársvikariat.

Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2008. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á góð samstarvsevni og at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin - gevið gætur - upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið á heimasíðuni: www.hoydalar.fo

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Mikkjal N. Helmsdal, rektara, á telduposti mikkjal.helmsdal@skulin.fo ella á fartelefon 218404.

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað og sent til

*Føroya Studentaskúli og HF-skeið,*
*att.: Mikkjal N. Helmsdal, rektari,*
*Hoydalar,*
*FO – 188 Hoyvík, Føroyar*

**í seinasta lagi 5. mai 2008.**

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.



# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?



Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA



# Ov tíðliga í verðina



Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á prematur@post.olivant.fo